## Arbeiðseftirlitið kannar Studentaskúlan

Mikudagin vóru fólk frá Arbeiðseftirlitinum og kannaðu arbeiðsumstøðurnar á Studentaskúlanum í Hoydølum. Hetta hendir eftir at fleiri rættiliga sterkar útsagnir eru komnar frá næmingum á skúlanum í seinastuni. Tá tað varð nevnt, at umstøðurnar á skúlanum vóru lívshættisligar, avgjørdu Arbeiðseftirlitið at kanna eftir, um nakað var í hesum tíðindum. Tey frá Arbeiðseftirlitinum hugdu seg væl um á skúlanum, og í gjár og aftur í dag verður arbeitt við at skriva eina frágreiðing um arbeiðsviðurskiftini á skúlanum. - Ætlanin er at fáa frágreiðingina lidna í dag, soleiðis at hon kann verða send av stovninum seinnapartin, upplýsir Karl Joensen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum. Mannagongdin er hon, at Arbeiðseftirlitið ikki úttalar seg um niðurstøðuna í eini slíkari frágreiðing. Tað má tann, ið fær frágreiðingina gera. Tí verður neyvan nakað at frætta í hesum máli, fyrrenn mánadagin í næstu viku!



## Enn ein merkt hara

Maelbastaðhálsi. Sjálvur hevur hann ikki nóg gott skil á merkingum, men hann heldur seg kortini duga at síggja, at haran er merkt "hálvt frá hálsi í høgra oyra". Tað er annars óvanligt, at menn fáa merktar harur, men fyrr í mánaðinum fekk ein maður eina merkta haru í Skáltahaga í Klaksvík. Okkurt bendir á, at henda haran í Skáltahaganum ikki var av Borðoynni men av Viðoynni. Møguliga er hon komin eftir byrgingina um Hvannasund. Aðrir meta hinvegin, at hon helst er merkt við tí merkinum, sum hoyrir til Múlahaga. Enn er kortini ógreitt, hvaðani henda haran á Velbastað er.

# Tók eitt døgn at taka støðu

**Tað kom eftir øllum at døma rættiliga óvart á Fólkaflokkin, at løgmaður í gjáramorgunin valdi at loysa Jacob Vestergaard úr starvi sum landsstýrismann. Flokkurin gjørdi tó av seinnapartin í gjár at halda fram í samgonguni. Á middegi kunngjørdi Jørgen Nicalsen á Rás 2, at hann fór at innstilla til løgmann, at Heðin Zachariasen verður nýggjur landsstýrismaður**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Allan seinnapartin í gjár sat øll ting- og landsstýrismanningin hjá Fólkaflokkinum á fundi á Gamla Apoteki og viðgjørdi politisku støðuna, sum kom í tá løgmaður stutt fyri middag loysti Jacob Vestergaard úr starvi sum innlendismálaráðharra.

Øll tekin í sól og mána bóru boð um, at hetta var eittstig, sum fólksfloksmenn ikki høvdu væntað og ikki vóru fyrireikaðir uppá. Og tí vóru teir – og ikki minst nýggi formaðurin – óvanliga lítið tíðindafróðir allan seinnapartin.

Fyrsti stóri spurningurin hjá floksovastunum var eyðvitað, hvussu teir skuldu takla støðuna. Skuldu teir velja at slíta samgonguna, ella skuldu teir velja at svølgja hendan kamelin.

Tað var týðiligt, at fyrstu báðir tímarnir av fundinum snúðu seg um hendan spurningin, tað sást á øllum brøgdum. Men um gott fýra-tíðina tóktist, sum hýrurin skifti og tað gjørdist alt meiri greitt, at hendan fyrsta og avgerandi støðan var tikin. Og av tí at flokkurin ikki meldaði út tá var líka greitt, at úrslitið mátti vera, at flokkurin helt fram í samgonguni, og at tosið síðani snúði seg um, hvør skuldi taka við eftir Vestergaard hesar báður knøppu mánaðirnar, ið eftir eru av valskeiðinum.

Tað skiltist á lagnum, at fleiri nøvn vóru uppi at venda, tað váttaði formaðurin í flokkinum eisini seinni. Og hóast eingi nøvn vórðu nevnd av hvørki formanni ella flokslimum annars, so vóru gitingar frammi í miðlunum.

Serliga fýra nøvn bleiv gitt um. Formaðurin sjálvur og Heðin Zachariasen úr tingmanningini, umframt Jákup Mikkelsen og Anika Olsen. Men Jákup Mikkelsen kundi tó skjótt strikast, tí við honum hevði Fólkaflokkurin komið í somu støðu sum Sambandsflokkurin rendi seg í, tá Bárður Nielsen segði seg frá sum fíggjarmálaráðharra. Tá vóru fyrstu útmeldingarnar, at floksformaðurin, Kaj Leo Johannesen, skuldi loysa av, men tað hevði ført við sær, at Heðin Mortensen hevði tikið sæti á tingi. Í førinum Jákup Mikkelsen, sum er avloysari hjá Anfinni Kallsberg og Jógvani við Keldu, hevði næsti maður – ella rættari kvinna – verið Rúna Sivertsen, ið jú sum kunnugt hevur skift flokk.

### Lá til Heðin

Jørgen Niclasen sjálvur gjørdist eisini skjótt eitt ivasamt evni. Hann er púra nýggjur formaður í flokkinum, og tí er løgtingsvalið fyri framman ein ógvuliga stór uppgáva fyri hann, tí hóast hann longu hevur roynt eitt val sum formaður, so er einki at ivast í, at hann neyvan – so ungur í formansstarvinum – hevði kunna staðið á odda fri einum løgtingsvali á nøktandi hátt, samstundis sum hann eisini røkti starvið sum Innlendismálaráðharri.

Hann er stutt sagt ov nýggjur í starvinum og tíðin er ov stutt.

Til hansara fyrimun talar tó, at hann hevur drúgvar royndir sum landsstýrismaður, men eitt ringt løgtingsval, samansett við, at hann eisini átók sær landsstýrismannastarv, hevði uttan iva ført ein øgiligan kritikk við sær.

Tað vil so siga, at vigast skuldi millum Anniku og Heðin.

Annika Olsen hevði eitt kanónval til fólkatingið, og verður hugsað strategiskt, er hon meiri ella minni tryggjað ein sess í komandi løgtingi. Tað kundi eisini hugsast, at tað er eitt sindur unfair at tveita hana í ein slíkan sess, tí hon er púra óroynd í amennari umsiting, og hevði tí neyvan fingið tíð at sett seg inn í mannagongdir fyri ikki at tosa um ymsu málini, áðrenn skeiðið er runnið.

Hjá Heðini er støðan nógv øðrvísi. Hann hevur drúgvar royndir sum borgarstjóri, og kennir tí longu framman undan mannagongdirnar í almennu umsitingini, umframt at hann sum løgtingslimur hevur eitt ávíst innlit í tey mál, sum hoyra undir Innlendismálaráðið.

So fyri hann er sessurin er eksponeringsmøguleiki, sum saktans kann koma honum til góðar til komandi løgtingsval.

Alt bendi tí longu undan fundinum í morgun á, at tað lá til Heðin Zachariasen. Og soleiðis bleiv.

Fundur var avtalaður millum løgmann og Jørgen Niclasen, floksformann, klokkan 14, har floksformaðurin fór at innstilla Heðin Zachariasen sum nýggjan landsstýrismann fyri Jacob Vestergaard.



*Tað tók Fólkaflokkinum meiri enn eitt døgn at finna útav, hvør skuldi avloysa Jacob Vestergaard, sum í gjár varð loystur úr starvi. Nýggi maðurin í landsstýrinum gjørdist Heðin Zachariasen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Nýggjur landsstýrismaðurin í Innlendismálum er Heðin Zachariasen, tingmaður úr Streymnesi*
*Savnsmynd*

# Heðin Zachariasen nýggjur landsstýrismaður

**Longu í gjár var gitt um, at tað skuldi verða norðstreymoyartingmaðurin, Heðin Zachariassen, sum skuldi loysa Jacob Vestergaard av, og soleiðis bleiv**

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Fólkafloksmaðurin í Norðstreymoy, Heðin Zachariassen úr Streymnesi, varð fyrstu valdur á ting 30. apríl 2002, og hann varð afturvaldur 20. januar 2004, tá hann aftur gjørdist limur í vinnunevndini, sum hann hevði verið undanfarna valskeið.

Heðin Zachariassen, sum gjørdist borgarstjóri í Sunda kommunu í 2005, hevur sitið í bygdarráðnum í Hvalvíkar kommunu, ið sum kunnugt er partur av Sunda kommunu, frá 1992 atil 1996, og borgarstjóri í Hvalvíkar kommunu frá 1997 til 2004.

Hann er føddur 13. september 1959, er giftur við Onnu Mariu Zachariasen, og eiga tey børnini Anju og Mirjam. Dagliga yrki hansara er arbeiðsformaður.